# Fundarbók hjá Eysturkommunu
# 520 Leirvík



**Býráðsfundur hósdagin 31. august 2017 kl. 18.00.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Gudny Langgaard, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen, Hans Mourits Foldbo, Uni Rasmussen

**Fundurin lokin kl. 20.30**

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| 1. | **17/00333**<br>**Útstykking á Fløtugerði í Leirvík**<br>Uppskot um útstykking, grundstykkir, vegaføring, gøtur v.m. er gjørt og er ætlanin, at bjóða arbeiðstøkuna út skjótast gjørligt.<br><br>Umsitingin mælir til at arbeiðstøkan til byggibúning av vegum, gøtur v.m. sambært fyriliggjandi tekning frá LBF verður bjóða út beinanvegin.<br><br>Játtan er til prosjektering og útbjóðing av arbeiðstøkuni.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at bjóða arbeiðstøkuna til byggibúning út beinanvegin. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.<br><br>Eisini var samtykt at økið sum er avlagt til íbúarbygging í fyriliggjandi uppskoti verður broytt til grundstykkir til sehús. |
| 2. | **17/00221**<br>**Umsókn um frávik til byggiloyvi, matr. nr. 199u í Syðrugøtu**<br>Eigari av matr. nr. 199u í Syðrugøtu hevur sent umsókn um leingjan av tíðarfreistini til bygging á grundstykki. Upplýst er í umsóknini, at ynskiligt er at byrja verður uppá húsini á summarið 2019.<br><br>Umsitingin mælir frá at geva frávik til tíðarætlan.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum frá umsitingini. | Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanini.<br><br>**Atkvøður fyri:**<br>Jóhan Christiansen, Gudny Langgaard, Uni Rasmussen, Árni Jacobsen, Hans Mourits Foldbo, Hanna Jensen<br><br>**Atkvøddi blankt:**<br>Hjaldi Dalheim, Tollakur Joensen, Brandur Jacobsen |
| 3. | **17/00289**<br>**Umsókn um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 199ab í Syðrugøtu**<br>Byggiharrin hevur sent umsókn um byggiloyvi við frávik. Frávikið er staðseting av bilhúsi, skúri og pláss til ruskíløt.<br><br>Umsitingin vísir á, at byggilinjan er 5,0 metur. Her verður bygd munandi nærri, men bilhúsið, skúrður og pláss til rúskíløt, sum skal byggjast | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini. |

**Býráðsfundur hósdagin 31. august 2017 kl. 18.00.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Gudny Langgaard, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen, Hans Mourits Foldbo, Uni Rasmussen

**Fundurin lokin kl. 20.30**

nærri vegnum og í vegin, er undir og ájávnt við veghædd. Hertil er at siga, at pláss er til fleiri biliar á matriklinum og bilhúsið er parallelt við vegin.

Byggi- og býarskipanarnevndin hevur á fundi tann 7. juli er mælt til at fylgja byggisamtyktini og byggilinjuna sambært treytunum. Býráðið hevur á fundi tann 13. juli samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

Fundur hevur síðani verið millum býráðið og byggiharran.

Byggi- og býarskipanarnevndin hevur viðgjørt málið aftur á fundi tann 28. august, og tá mælir meirlutin Uni Rasmussen og Tollakur Joensen til at geva frávik, og at gerða eina rætting í byggisamtykini um byggilinjur í veghædd og yvir veghædd, umframt frágreiðing um sama. Minnilutin Árni Jacobsen tekur støðu á býráðsfundinum.

**4. 17/00252**

**Umsókn um byggiloyvi við frávik, matr. nr. 215n í Syðrugøtu**

Byggiharri og eigari av matr. nr. 215n í Syðrugøtu hevur sent umsókn um byggiloyvi við frávik til byggilinjuna

Umsitingin mælir til at geva loyvi til frávik, grundað á, at byggilinjan er 8,5 metur og við fráviki kemur nærmasta húsahorn at verða 7,0 metur frá vegnum. Tað er ikki til ampa fyri grannar, ferðslu v.m., hartil er henda útsykking gjørd av Gøtu kommunu.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðsfundur hósdagin 31. august 2017 kl. 18.00.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Gudny Langgaard, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen, Hans Mourits Foldbo, Uni Rasmussen

**Fundurin lokin kl. 20.30**

**5. 17/00281**

**Umsókn um byggiloyvi til bilhús, hjall o.a. á matr. nr. 94a í Syðrugøtu**

Byggiharri og eigari av matr. nr. 94a í Syðrugøtu hevur sent umsókn um byggiloyvi til bilhús og hjall o.a. sum verður bygd í mark hjá Eysturkommunu.

Umsitingin mælir til at geva byggiloyvi, men tað er ikki loyvt at parkera bil frammanfyri bilhúsið og tað má ikki verða nøkur forðing fyri bilum sum skulu parkera á matr. nr. 94b ið er alment øki.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum frá umsitingini, men kommunan skilur sær rætt til, um tað gerst neyðugt, at broyta økið matr. nr. 94b í framtíðini til annað endamál, sum kann hava ávirkan á innkoyring til bilhúsið ella matr. nr. 94a, verður gjørt uttan endurgjald til eigara av matr. nr. 94a.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

.

**6. 13/00063**

**Gøtu skúli – víðkan av spæliplássinum**

Støðutakan til innkomin tilboð.

Í sambandi við býráðssamtykt um víðkan av spæliplássinum, ella liðugtgerð av spæliplássinum við skúlan í Gøtu, hevur umsitingin innheinta tilboð frá 2 upp á veiting og uppseting av útleikum, undirlendi og planering av økinum.

Umframt tilboð frá 2 veitarum skal ljósmastrar, fundamentir og káplar veitast og monterast á økinum.

Umsitingin mælir til, at gera avtalu við veitara sum hevur tað lægra tilboðið, tá ið møguligar reguleringar eru gjørdar í mun til fyriliggjandi tilboð og við verandi játtan.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at taka av lægra tilboði eftir samráðingar við tilboðsgevarnar og biðja um eykajáttan upp á kr. 150.000,00.

Einmælt samtykt at taka av lægra tilboðnum sum er frá Insparkund aljóðandi 1.363.775,00, uttan mvg, treyta av at skúlastýri kann góðtaka tað.

*Árni Jacobsen var úti undir viðgerðini vegna ógegni.*

**Býráðsfundur hósdagin 31. august 2017 kl. 18.00.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Gudny Langgaard, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen, Hans Mourits Foldbo, Uni Rasmussen

**Fundurin lokin kl. 20.30**

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**7. 16/00337**

**Niðurtøka av bygningi á matr. nr.188a í Norðragøtu**

Uppskot til avtalu fyriliggur, og umsitingin mælir til at góðkenna fyriliggjandi avtalu.

Fíggjarnevndin mælir til at góðkenna fyriliggjandi avtalu, peningurin verður tikin av konto 6.22.11.510 (byggibúning).

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

*Jóhan Christiansen og Tollakur Joensen vóru úti vegna ógegni.*

**8. 17/00339**

**Uppskot til neystabygging í Norðragøtu**

Jóhan Christiansen, borgarstjóri skjýtur upp:

1. *At kommunan gevur loyvi til at byggja neyst millum vegin "Tróndargøta" og vegin framvið havnarlagnum. Skotið verður upp, at byrja verður við tað sama, og so uttaliga sum møguligt og inn móti uml. helvtina av hesum stykkinum. Til. uml. Trónadargøtu 59. (sí viðlagda kort)*

2. *At frá Tróndargøtu 59 og inn til Tyrlhúsgrundina verður ein serstøk byggisamtykt gjørd, har m.a. hæddirnar av komandi neystum verður sett í mun til grannalagið á Tróndargøtu.*

3. *At Tyrlhúsgrundin verður nýtt til eitt fríðøkið, og ikki til neystabygging.*

4. *At tey sum eiga neyst á Oyruni, fáa boði neystagrundir sbrt. hesum uppskotið við tað sama, so neystini á Oyruni kunna vera tikin niður, eins og avtala er við teir eigaranar.*

Einmælt samtykt at taka undir við uppskotinum, tó verður punkt 3. strikað.

**Býráðsfundur hósdagin 31. august 2017 kl. 18.00.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Gudny Langgaard, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen, Hans Mourits Foldbo, Uni Rasmussen

**Fundurin lokin kl. 20.30**

**9. 17/00283**

**Umsókn um loyvi at gera veg frá matr. nr. 278 oman á Kráarvegin í Leirvík**

Umsókn er móttikin um loyvi at leggja veg ígjøgnum ogn umsøkjarans, sum er matr. nr. 273 og 278 í Leirvík og knýttur í Kráarvegin ið er kommunalur vegur.

Umsitingin mælir til at umsøkjarin fær loyvi at gera veg á matr. nr. nr. 273 og 278 og at knýta vegin í Kráarvegin. Umsøkjari skal senda umsókn við tekningum og frágreiðing um vegin, áðrenn byggiloyvi verður givið.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til til at umsøkjarin fær loyvi at gera veg ígjøgnum matr. nr. 273 og 278.

Málið tikið av skrá.

**10. 17/00340**

**Keyp av matr. nr. 249 í Leirvík**

Umsitingin hevur fyri tíð síðani tosað við umsøkjaran og boðað frá, at kommunan hevur ynski um, at keypa matr. nr. 249 í Leirvík.

Ánarin hevur boðað frá at hann er sinnaður at selja.

Umsitingin mælir til at Eysturkommuna keypir matr. nr. 249 í Leirvík.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at keypa matr. nr. 249.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**11. 17/00092**

**Umsókn um loyvi at leggja veg til matr. nr. 51b í Norðragøtu.**

Umsókn er móttikin um loyvi at leggja veg frá Stallagøtu og inn á matr. nr. 51b í Norðragøtu. vegurin verður 3,0 m breiður.

Málið var fyri á býráðsfundi tann 1. mai og var tá samtykt, at hava grannahoyring, áðrenn støða verður tikin í málinum. Hetta er síðani gjørt og

Atkvødd bleiv um tilmæli hjá byggi og býarskipanarnevndini.

**Atkvøður fyri:**
Tollakur Joensen, Uni Rasmussen, Hjalti Dalheim

**Atkvøður ímóti:**
Jóhan Christiansen, Gudny Langgaard,

**Býráðsfundur hósdagin 31. august 2017 kl. 18.00.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Gudny Langgaard, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen, Hans Mourits Foldbo, Uni Rasmussen

**Fundurin lokin kl. 20.30**

hevur Eysturkommuna móttikið skriv dagf. 12. mai 2017 frá grannum.

Umsitingin mælir til at geva loyvi at gera 3,0 m breiðan veg á matr. nr. 51b og binda vegin í Stallagøtu við treytum.

Byggi- og býarskipanarnevndin viðgjørdi málið aftur á fundi tann 19. juni 2017, og mælir til at umsøkjarin fær loyvi at gera veg inni á egnum øki og at umsøkjarin skal senda umsókn við vegaprosjekti, at kommunan fær servitutt á økið til parkering, at vegurin ikki verður brúktur til parkering av lastbilum, tailarum, bingjum v.m.

Árni Jacobsen, Hans Mourits Foldbo

**Atkvøddi bankt:**
Brandur Jacobsen

*Hanna Jensen var úti undir viðgerðini vegna ógegni.*

**12. 17/00345**

**Søla av grundstykkjum Undir Gøtueiði**
Jóhan Christiansen, borgarstjóri skjýtur upp:

*At tey 6 grundstykkini sum hava ligið tøk í uml. 10 ár Undir Gøtueiði, vera lýst til sølu fyri 25.000 kr. pr. stk.*

*Talan er um grundstykkini matr. 281 q, r, s, t, v og u Undir Gøtueiði.*

Einmælt samtykt at taka undir uppskotinum.

**13. 16/00307**

**Vegur til útstykking í Norðragøtu – Vinnuøki C2**
Støðutakan til innkomin tilboð.

Einmælt samtykt at taka av lægsta tilboðnum sum er frá JHR, Runavík áljóðandi 3.287.086,00 uttan mvg.

**14. 17/00304**

**Barnagarðurin Brúsi – Útbygging 2017**
Støðutakan til innkomin tilboð.**6/00307**

Einmælt samtykt at taka av lægsta tilboðnum sum er frá Sp/f Jóhan Heinesen áljóðandi 2.364.168,00

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________________

Árni Jacobsen ______________________________

# Fundarbók hjá Eysturkommunu
# 520 Leirvík



**Býráðsfundur hósdagin 31. august 2017 kl. 18.00.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Gudny Langgaard, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen, Hans Mourits Foldbo, Uni Rasmussen

**Fundurin lokin kl. 20.30**

Hanna Jensen ______________________________________________

Gudny Langgaard ______________________________________________

Tollakur Joensen ______________________________________________

Hans Mourits Foldbo ______________________________________________

Brandur Jacobsen ______________________________________________

Hjalti Dalheim ______________________________________________

Uni Rasmussen ______________________________________________